hevur pengar til hesar útbúgvingar.

Tað kostar at útbúgva hesi fólkini, og ein partur má koma frá landinum. Sjálvt um ein kann vóna, at nakað av virkseminum kann verða sponsorerað av øðrum. Men tað má so altíð finnast ein basisfígging, sum ger tað møguligt at til rættaleggja.

Hans Pauli Joensen dylur ikki fyri, at tær ætlanir, sum hann her hevur umrøtt, koma at kosta eyka. Men hetta við at útbúgva fólk er ein góð íløga í framtíðina.

Tí haldi eg eisini, at okkara politikarar mugu gera sær greitt, at tað er neyðugt at fáa útbúgvið fólk. Og at tað eisini kostar pengar at útbúgva fólk. Teir mugu eisini gera sær greitt um teir vilja, at vit skulu útbúgva fólk her í landinum.

Hans Pauli Joensen nevnir í hesum sambandi aðrar spennandi møguleikar, og her sipar hann til eftirútbúgving av fólki, sum longu hava eina útbúgving.

Slík avtala sum henda kann gera tað møguligt hjá eitt nú verkfrøðingum, sum hava verið við til at byggja út okkara infrastruktur, tvs. vegir og havnir, til at umskúla seg til eina komandi oljuvinnu.

Hetta er so nakað, sum hædd verður tikin til í teimum tilboðum, sum Fróðskaparsetrið fer at bjóða út. Tvs. at tú hevur møguleika at aktivera og motivera longu útbúgvin fólk, sum í dag kanska einki arbeiði hava men sum sita inni við bæði royndum og nógvari vitan. Tað ræður bert um at eftirútbúgva hesi fólkini.

Hans Pauli Joensen leggur tó dent á, at her er fyrst og fremst talan um at geva studentum nakrar tilboð men so sanniliga eisini øðrum í samfelagnum.

**Føroyingar vælkomnir til Stavanger**

Undir hátíðarhaldinum í Nóatúni í gjár í sambandi við undirskriving av avtalunum greiddi rektarin á Høgskolen i Stavanger, Erik Leif Eriksen frá nýggja samstarvinum, og hann gleddi seg til at síggja nógvar føroyingar hár á skúlanum komandi árini.

Hann visti á, at vónandi eru avtalurnar um tær meira tøkniligu útbúgvingarnar við atliti til oljuvinnu bara byrjanin. Tí møguleikarnir fyri at útbúgva seg á øðrum økjum innan oljuvinnu, eitt nú oljujura og oljubúskap og so eisini á heilt øðrum økjum, eru stórir. Høgskolan i Stavanger hevur í dag 6000 næmingar.

Tá avtalan varð undirskrivað vóru eisini umboð fyri Landsskúlafyrisitingina, Føroya Oljuídnað og norska oljufelagið Statoil við.

Hans Pauli Joensen takkaði Paula Einarsson fyri at hava verið so framsíggin og umhugsin, tá hann á kanningarferð í Noregi knýtti samband millum Føroyar og norska útbúgvingarverkið.

Pauli Einarsson segði seg vera sera fegnan um, at hetta hevði gingið so væl í hond og so skjótt. Hann metti tað hevur stóran týdning at kunna brúka av vitanini hjá hvørjum øðrum.

Claus Reistrup frá Landsskúlafyrisitingini, sum hevur havt til uppgávu at samskipa alt hetta, sigur við Sosialin, at tað er hugaligt at síggja, hvussu ríkilig og positiv úrslit spyrjast burtur úr. Hann heldur tað eisini vera gott at síggja, hvat kann koma burtur úr, tá teir ymsu útbúgvingarstovnarnir í Føroyum arbeiða saman.

Hetta málið er so eitt dømi um, at tað ber til arbeiða saman og fáa nakað gott burtur úr fyri samfelagið. Hetta er so bert byrjanin. Vónandi kunnu vit byggja víðari á hesa góðu byrjan sigur Claus Reistrup.

**Fróðskaparsetrið meira internationalt**

Jóan Pauli Joensen, rektari á Fróðskaparsetrinum sigur í eini viðmerking, at talan er um ein merkisdag fyri føroyska útbúgvingarverkið sum heild og hann heldur, at Fróðskaparsetrið við hesi avtalu vísir, at tað er við at gerast meira internationalt, nakað sum er avgjørt rætta leiðin at ganga. Hann sær fram til eitt fruktagott samstarv við Høgskolan i Stavanger og vónar eins og starvsbróður hansara hár, at samvinnan kann útbyggjast til at fevna um mangar aðrar lærugreinir og fak eisini.



*Erik Eriksen, rektari á Høgskolan i Stavanger sær fegin, at føroyingar útbúgva seg í Noregi. Mynd J. Helmsdal*



*Umboð fyri Maskinmeistaraskúlan, Sjómansskúlan og teknisku skúlarnar og Stavanger maritime videregående skole skriva undir avtaluna. Mynd Álvur Haraldssen*




# RIMMAR BINGO!

verður í HAVNAR KLUBBA
SUNNUDAGIN 2. mars, kl. 16.00

| FULL PLÁTA | 2 REKKJUR | 1 REKKJA |
|---|---|---|
| 2 x 500 l av olju frá Statoil | 5 máltíðir fyri tvey á Hafnia | 10 x feskur døgurðamatur |
| 5 ísl. krov | 5 ks. av 1/2 l. sodavatni frá Føroya Bjór | Gisting á Fjalsgarði 6 fólk 1 nátt |
| 5 gávukort á 600 kr. | Gisting á Giljanesi og Fjalsgarði - 6 fólk 2 nætur | Gisting á Giljanesi 6 fólk 1 nátt |

**15 VINNINGAR Á LUTASEÐLI:**
m.a. 1000 l. av olju frá Statoil, Gjugg í Borg ferð, Vikuskiftisferðaseðil til Danmarkar

Fráhaldsarbeiðið á Fjalsgarði